# Smáligur svartkjaftafiskiskapur í seinastuni

**Poul H. Sólstein á Havsbrún sigur, at tað er vanligt hesa tíðina av árinum, at fiskiskapurin er misjavnur. - Stundum er meira at fáa, og stundum er minni, sigur hann**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Fiskiskapurin hjá svartkjaftaskipunum, sum royna í ein útnyrðing úr Mykinesi, hevur verið smáligur seinastu 2-3 vikurnar.

Poul H. Sólstein á Havsbrún sigur, at tað er vanligt hesa tíðina av árinum, at fiskiskapurin er misjavnur.

- Stundum er meira at fáa, og stundum er minni. Vit vænta tó, at flestu skipini fara at halda seg á svartkjaftinum tað mesta av hesum árinum.

Hann vísir á, at vanliga fiska skipini í føroyskum og íslendskum sjógvi hesa tíðina.

### Landingar

Í síðstu viku landaðu Christian í Grótinum og Tróndur í Gøtu á Havsbrún. Christian var knappliga fullur, og Tróndur hevði eini 1400 tons.

Mánadagin í hesi vikuni var Høgaberg inni við 300 tonsum av svartkjafti, og týsdagin var Krúnborg við 2500 tonsum. Hesin túrurin hjá Krúnborg var hampiliga góður.

Norðborg landaði í Fuglafirði í gjár; teir høvdu fult skip av frystari sild og eini 800 tons av sild til ídnað.

Poul H. Sólstein veit at siga, at Høgaberg er farin norðureftir á sildaveiði, men óvist er, hvar skipið fer við veiðini.

- Prísurin á sild til matna er lágur í løtuni, sigur hann.

Jupiter er í Danmark, har arbeitt verður við kølingini, og væntandi fer Krúnborg eisini úr vinnu eina tíð, tí spølini skulu møguliga skiftast.

Poul H. Sólstein veit at siga, at Saksaberg er á sild, men tá ið vit fréttu mikudagin, var hann ikki vísur í, hvar Finnur Fríði er í løtuni.

# Upsa og hýsumarknaðurin eru kollapsaðir

**Uppá stutt sikt, sær ógvuliga dapurt út hjá partrolarunum, sum veiða upsa og línubátunum, sum veiða hýsu. Nógvur fiskur er at fáa, men marknaður er eingin. Hósdagin fór upsi fyri 2-2,50 kr. fyri kilo, og hýsa 3 fór mikudagin fyri 3,50 fyri kg. Hetta eru ikki prísir, sum nakar kann liva við, hvørki skip ella manningar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað gongur alt annað enn væl á feskfiskamarknaðinum í Føroyum í løtuni. Prísirnir á upsa og hýsu eru í botni. Sum skilst á vinnuni, verður galin endi, um vend ikki kemur í*

Marknaðarstøðan hjá upsa og hýsu hevur leingi verið ógvuliga vánalig, men hitabylgjan, sum hevur herjað í summar, hevur gjørt støðuna uppaftur verri.

Fólk, sum starvast í vinnuni, eru ógvuliga dapurskygd í løtuni. Tey siga, at sæð uppá stutt sikt, verður galin endi, so vánalig sum støðan í veruleikanum er. Umborð á trolarunum, sum veiða upsa og línuskipunum, sum veiða hýsu, er lagið ringt. Hýrurnar eru falnar við 30-40% og í einstøkum førum við 60%. Útróðrarmenn tíma ikki at loysa, tí lítið og einki fæst fyri fiskin. Menn rýma av skipunum, tí hóast nógv er at fiska, fæst einki burtur úr. Tað, sum hevur hildið partrolarunum og línubátunum uppi, er, at skipini hava havt nøkur góð ár, men sum tíðin líður, og eingin broyting kemur í, sær alt daprari út.

### Vinnan á landi

Í vinnuni á landi er skilið tað sama. Saltaður upsi selist ikki, og tað ger hýsan treyðugt heldur. Virkini kring landið hava stórar trupulleikar, tí torført – fyri ikki at siga ógjørligt - er at fáa sáttmálar um framleiðslu av upsa og hýsu.

Trupulleikar eru eisini við gulllaksinum, sum skipini veiða hesa tíðina av árinum.

Í Miðvági, har tey hava arbeitt gulllaks um summarið - og eisini í summar, er einki arbeiði og sum skilst, ætlar Tavan í Leirvík eisini at gevast.

Á Tavuni plaga tey at arbeiða upsa, tá ið eingin gulllaksur er, men ivasamt er, um nakað verður gjørt við upsan, soleiðis sum støðan er í løtuni.

### Spottprísir

Hósdagin í hesi vikuni fór upsi fyri 2 kr. fyri kilo, og hýsa 3 fór mikudagin fyri 3,50 fyri kg.

Í fjør, tá ið virkini byrjaðu aftur eftir summarsteðgin, var prísurin á upsa einar 5 kr. fyri kg. Nú er hann heilt niðri á 2-2,50 fyri kg.

Hetta eru ikki prísir, sum nakar kann liva við, hvørki skip ella manningar.

Í vinnuni siga tey, at prísurin á gulllaksi er fallin heilt niður á kr. 2,75, og tí verður ein patur av veiðini fyribils løgd upp og goymd í Runavík.

Tungur sjógvur

Fólk, sum standa vinnuni nær, siga, at kemur ikki vend í við prísinum á upsa og hýsu, er vandi fyri, at í fyrsta lagi ísfiskatrolararnir og síðan línuskipini fara at sigla í ógvuliga tungum sjógvi.

Hetta er ein syndarlig støða, tí trupulleikin er ikki, at ov lítil fiskur er at fáa. Nógv er at fáa, bæði av upsa og hýsu undir Føroyum.

Í Íslandi fáa teir eisini nógva hýsu, og har hava teir økt hýsukvotuna við eini 20.000 tonsum. Dollarin er lágur, og tí loysir tað seg ikki hjá íslendingum at selja 5-punds vøruna, sum teir eru so kendir fyri, í USA. Úrslitið er, at bretski hýsumarknaðurin gongur undir í hýsu – og prísirnir eru hareftir.

### Saltfiskur

Hóast eingin marknaður er fyri saltaðan upsa, gongur betur við toskinum, tí hann er nógv meira stabilur.

Føroyingar eru nevniliga ógvuliga væl fyri á útlendska marknaðinum, tá ið ræður um saltaðan tosk. Her hava vit sum framleiðarar ein serligan status. Vit hava gott fólk, sum stíla fyri á landi, og útlendsku keypararnir hava stórt álit á toskinum, sum kemur úr Føroyum.

Í vinnuni halda fólk tí ikki, at nakar vandi er við toskinum á útlendska marknaðinum.

# ítróttur

Nr. 162 • fríggjadagur • 29. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Todi Jónsson:

# - Vit fáa ongantíð slíkan møguleika aftur

**- Vit høvdu í veruleikanum uppiborið at vinna dystin, tí vit høvdu tamarhaldið á leikgongdini størsta partin av dystinum. Vit fáa ongantíð so góðan møguleika fyri at koma víðari sum hesuferð. Soleiðis dró Todi Jónsson samanum eftir dystin millum FCK og Rangers**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*- Fyri einum ári síðani var eg í somu støðu sum nú. Tá hevði FCK eisini keypt ein áleypara, sum skuldi vera fantastiskur, og eg varð settur uttanfyri, sigur Todi um núverandi støðu sína í felagnum*

**Sosialurin, Keypmannahavn:**
Tað var sjálvsagt ein sera vónbrotin Todi Jónsson, sum Sosialurin hitti í Parkini mikukvøldið.

FCK hevði júst tapt 2-1 ímóti skotsku meistarunum Glasgow Rangers og harvið spælt sær av við møguleikan fyri at spæla Champions League fótbólt í ár.

- Sjálvandi eru vit allir sera vónbrotnir av hesum úrslitinum. Vit fáa ongantíð so stóran møguleika fyri at koma víðari í Champions League, segði Todi.

Tann fyrri dysturin á Ibrox leikvøllinum í Glasgow endaði 1-1, og tá skoraði Todi tað útjavnandi málið fyri FCK. Við einum máli á útivølli skuldi verið lag á manni at spæla seg víðari til bólkaspælið í Champions League. Nakað, sum FCK ongantíð hevur roynt í søgu felagsins, men sum avgjørt er eitt av aðalmálunum hjá bossinum Flemming Østergaard.

- Hatta var ein harður dystur, og eg fekk ongantíð nakrar rennibóltarnar, segði Todi um dystin. Todi hevði eina roynd uppá málið hjá týska málverjanum Stefan Klos, tá hann fyrst reiv seg leysan av verjuni, men ov lítið veiggj var í skotinum frá klaksvíkinginum.

### Tamarhald

- Eg haldi, at vit høvdu uppiborið at koma víðari, tí vit stýrdu dystinum inntil tað fyrra málið hjá teimum, segði føroyingurin við 12-talinum á baki. Serliga iðrar Todi seg um tað fyrra málið hjá skotska liðnum.

Hetta verður ungverski málverjin Balázs Rabóczki, sum nú hevur fingið eyknevnið "Radropski" í donskum fjølmiðlum, at taka á sín kappa. Málverjin megnaði ikki at halda einum frísparki frá Rangers, og bólturin datt út aftur í málteigin, har Urmas Rooba og ein Rangers leikari stríddust um bóltin, og endin var, at dómarin peikaði á brotssparksblettin.

Hetta var sostatt ein gyltur møguleiki hjá Toda og liðfeløgum hansara at sleppa til tað lovaða landið, har milliónirnar rulla í kassan hjá feløgunum. Mett verður at FCK hevði fingið umleið hálvthundrað milliónir krónur burturúr luttøku í bólkaspælinum, og leikararnir høvdu fingið 250.000 krónur í bonus í part.

### Mugu koma víðari

Tað verður óivað torført hjá FCK leikarunum at leggja hetta tapið afturum bak, tí hetta var í ein gyltur møguleiki, sum teir fingu, í orðsins sanna týdningi.

- Vit mugu royna at vera professionellir og koma víðari, hóast tað er sera torført at svølgja hetta tapið, segði Todi Jónsson. Sunnudagin spælir FCK á heimavølli ímóti AGF, og tá væntar viðhaldsfólkið sær ein sigur.

Todi varð tikin út miðskeiðis í seinna hálvleiki, og tað var hann sjálvsagt eisini vónsvikin av.

- Sjálvandi eri eg eisini vónbrotin av at verða skiftur út, tí mann vil altíð spæla allar 90 minuttirnar. Tað er næstan blivin til eina tradisjón, at eg verði tikin út eftir 60 minuttir, segði Todi eftir dystin.

Nýggi áleyparin hjá FCK, brasiliumaðurin Álvaro Santos, varð settur inn fyri Toda, og hann skoraði eisini málið til 1-1. Nú eru fimm áleyparar í felagnum, men enn hevur Todi staðið frammalaga í útveljingini hjá venjaranum.

Spurdur um hann væntar, at hansara tíð á vøllinum verður meira avmarkað framyvir, svarar Todi, at FCK hevur ikki keypt ein áleypara fyri nærum tíggju milliónir fyri at sita á bonkinum. Tí kann væntast, at Todi aftur fer á beinkin at sita, tá Santos verður ordiliga klárur at spæla.

- Fyri einum ári síðani var eg í somu støðu sum nú. Tá hevði FCK eisini keypt ein áleypara, sum skuldi vera fantastiskur, og eg varð settur uttanfyri, sigur Todi um núverandi støðu sína í felagnum, sum aftur er hótt av einum nýggjum leikara.

Leikarin, sum Todi sipar til, er sviin Jørgen Petterson, sum ongantíð hevur sligið til sum áleypari, og nú er Todi frammanfyri hann í útveljingini í áloppinum.

Tað glapp sostatt av hondum hjá FC København á hesum sinni, og møguliga fáa teir ongantíð ein so góðan møguleika fyri at møta teimum heilt stóru aftur.

